gult22 cyan22 magenta22 svart22



# KÍ heldur kósina

**Tað stóð nógv á hjá KÍ, men tær megnaðu kortini at basa VB, og liggja einsamallar á odda í bestu kvinnudeildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Annað umfar í fótbóltskappingini hjá kvinnum varð leikt um vikuskiftið, og hesa ferð var talan um tveir avbera spennandi dystir. VB var fýra minuttir frá at fáa stig í Klaksvík, meðan B36 við 10 leikarum bardi seg upp á javnt móti HB, fyri síðani at síggja møguleikan fyri stigum hvørva.

## Glapp hjá VB

Í Klaksvík var KÍ helst greiður favorittur undan heimadystinum móti VB, og at byrja við sá eisini út til, at heimaliðið skuldi vinna stigini. Eftir fáum minuttum hevði Malenda Josephsen nevnliga lagt heimaliðið framum, og eina løtu eftir hetta helt KÍ eisini á at trýsta oman móti VB málinum.

Tað eydnaðist tó vágbingunum at verja fyri trýstinum, og talan var framvegis bert um hitt eina málið, tá farið varð til hálvleiks.

KÍ royndi eisini at trýsta seg til fleiri mál í seinna hálvleiki, men brádliga svaraði VB aftur. Marita Joensen átti seinasta fótin á eftir VB álop, og við bert fýra minuttum eftir at spæla, var nú líkt til, at heimaliðið kortini mátti lata stig frá sær.

Um tað var, tí VB nú kannaði sær bitan ov skjótt, skal ikki verða staðfest, men í øllum førum nýtti KÍ ikki langa tíð um at gera bart, at tær vildu hava stigini. Bólturin varð givin upp, og eftir at Vivian Bjartalíð hevði rikið seg oman á VB hálvuna, spældi hon víðari til eina leysa Malenu Jospehsen, og toppskjúttin í landskappingini tók av alt fyri eitt.

## Eyðfríð bjargaði HB

Í Gundadali var lokaluppgerð millum tey bæði stóru havnarfeløgini, og ikki kann sigast annað enn, at talan her gjørdist um ein dyst av teimum heilt lívligu.

Fyri HB kundi dysturin valla fingið eina verri byrjan, tí eftir bert tveimum minuttum var B36 á odda, eftir at HB verjuspælari sjálv átti seinasta fótin á.

Støðan helt sær nakað væl inn í fyrra hálvleik, men seinna helmingin av hesum ekploderaði HB. Kristina Eyðbjørnsdóttir javnaði fyri roknskapin, og síðani skutu Lydia Vesturtún og Eyðfríð Kristiansen hvør sítt mál.

Í seinna hálvleiki sá eisini út til, at nú var leyst og liðugt hjá HB. Ikki bert førdu tær við tveimum málum, men B36 varð eisini skert, tá Elsebeth Jónsson fekk reyða kortið fyri at nýta neyðbremsuna móti Eyðfríð Kristiansen.

Hetta fekk tó bara B36 liðið til at bíta tenninar saman, og tað eydnaðist teimum eisini at skapa spenning í aftur dystin. Fyrst minkaði Súnfríð Simonsen um munin, og tá Sólvá Joensen so eisini javnaði fyri tær hvítu, tóktist skelkurin hjá HB at vera fullkomin.

Eyðfríð Kristiansen hevði tó ikki á nakran hátt mist móti, og tað var eisini fyrst og fremst hon, sum syrgdi fyri einum sigri til HB. Við tveimum málum seinastu løtuna tók hon seinastu luftina úr B36 trýstinum, soleiðis at tað í tølum kortini gjørdist til ein hampuliga tryggan HB-sigur.

KÍ-VB 2-1 (1-0)
1-0: Malenda Josephsen 3.
1-1: Marita Joensen 86.
2-1: Malena Josephsen 87.

B36-HB 3-5 (1-3)
1-0:sjálvmál 2.
1-1: Kristina Eyðbjørnsdóttir 24.
1-2: L;ydia Vesturtún 33.
1-3: Eyðfríð Kristiansen 42.
2-3: Súnfríð Simonsen 67.
3-3: Sólvá Joensen 74.
3-4: Eyðfríð Kristiansen 78.
3-5: Eyðfríð Kristiansen 81.

**Støðan, 1. deild kvinnur:**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 2 | 2 - 0 - 0 | 8 | 2 | 6 | 6 |
| 2 | HB | 2 | 1 - 1 - 0 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 3 | VB | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 4 | B36 | 2 | 0 - 0 - 2 | 4 | 11 | -7 | 0 |

**Støðan, 2. deild kvinnur:**

Bólkur A:

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 2 | 2 - 0 - 0 | 6 | 0 | 6 | 6 |
| 2 | B71 | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 | ÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 4 | GÍ | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

Bólkur B:

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 1 | 1 - 0 - 0 | 15 | 1 | 14 | 3 |
| 2 | Skála | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 | Sumba | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 15 | -14 | 0 |

# Yvirvág av havnarmonnum á Sandi

**Størsti parturin av besta liðnum hjá B71 eru leikarar, sum eru uppaldir aðra staðni enn á Sandi**

HAGTØL
*Ivan Egインsson*

Tað stendur ikki so væl til í B71 við tilgongd av ungum leikarum. Tí eru sandoyingar noyddir til at brúka aðrar møguleikar fyri at styrkja um hópin hjá sær.

Tað ljóðar næstan ótrúligt, men á B71-liðnum, ið vann 1-0 á EB/Streymi sunnudagin, spældu heili tíggju leikarar, sum eru uppvaksnir í øðrum feløgum, og bert fýra upprunaligir sandoyingar: Eli Hentze, Bergleif Sólsker, Jógvan Jón Petersen og Hans Meinhard Midjord. Av hesum fýra eru einans Eli Hentze og Bergleif Sólsker fastbúgvandi á oynni. Tað eru útlendingarnir, Valdemar Nowicki og Julian Florescu, eisini. Allir hinir búleikast í Suðursteymoy.

Við leikandi venjaranum Kára Reynheim á odda kundu havnarmnenn næstan mannað sítt egna lið heima á Sandi, serliga tá ið hugsað verður um til dømis Høgna Hansen og Flóvin av Fløtum Jespersen, sum av ymsum orsøkum vóru uttanfyri sunnudagin. Sørvingarnir hjá B71 Petur Ritter og Bjørn Thorsteinsson búgva eisini í høvuðstaðnum.

Toftamenn kunnu kanska ikki klaga so nógv um fráflyting av ungum fólki, sum tey í Sandoy, men støðan viðvíkjandi egnum ungum fótbóltsleikarum er ikki nógv øðrvísi í B68, enn hon er í B71.

Einans fýra upprunaligir toftamenn (Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen, Jan Petersen og Oleif Joensen) byrjaðu í dystinum í Gundadali ímóti HB, og ein afturat, Øssur Jacobsen, kom inn í 2.hálvleiki. Jan C. Dam og John Heri Dam eru uppvaksnir í HB, Magnus E. Poulsen í B36, Arnold Joensen í KÍ, Hans Fróði Hansen í LÍF, og Mortan Hansen í grannafelagnum NSÍ. Marlon Jorge var einasti útlendingurin á liðnum hjá B68 sunnudagin. Men við í hópinum hava toftamenn tveir aðrar brasiljumenn, Marcelo og Messias, og sjálvandi Súna Fríða Johannesen, ið hevur spælt inni á Toftum í fleiri ár samanlagt, men hann er heldur ikki toftamaður.

Hinvegin fekk tann unga vónin hjá B68, 17-ára gamli Jann Ingi Petersen, ikki møguleika fyri at vísa sínar dygdir ímóti HB, men unglingurin av Saltnesi verður ivaleyst at síggja á besta liðnum hjá toftamonnum hetta kappingarárið.

# Runavíkingar royna egið fólk

**Av teimum trettan NSÍ'arunum á vøllinum móti B36, var bert ein, sum ikki er ættaður úr Runavíkini**

HAGTØL
*Ivan Eginsson*

Fyri nøkrum árum síðani var tað ikki so vanligt í Føroyum, at leikarar skiftu millum feløg, og útlendingar í føroyskum fótbólti kundu næstan teljast á aðrari hond. Tá ið NSÍ stillar upp í ár við einum 1.deildarliði, ið næstan er mannað av leikarum, sum hava slitið sínar fyrstu barnaskógvar í felagnum, man slíkt vera eindømi.

Nú hevur NSÍ aftur fingið helst kendasta runavíkingin í heiminum, Jens Martin Knudsen, inn í hópin, samstundis sum gøtumaðurin Rúni Joensen er farin avstað aftur, og so er veteranurin Abraham Løkin, ið býr í Saltangara, men er uppvaksin í Fuglafirði, givin við fótbólti á høgum støði.

Eins og HB, brúkar NSÍ ikki útlendska arbeiðsmegi. Men í mun til havnarmenninar, fáa runavíkingar størri nyttu av sínum egnu spælarum. Trettan NSÍ-arar, ið fingu málleysan javnleik ímóti B36 í 1.umfari í landskappingini, eru ættaðir úr Saltangara, Runavík ella Rituvík, sum eru partar av Runavíkar kommunu.

Einasta undantakið í so máta er leirvíkingurin Gert Langgaard. Nakrir av núverandi NSÍ-arunum hava tó roynt seg aðrastaðni. Jens Martin Knudsen hevði verið burtur í næstan tíggju ár, Djóni N. Joensen hevur spælt við B36, Elian Hansen við VB, og Ian Højgaard hevði í nøkur ár verið í Danmark.



*Ian Højgaard telist millum mongu NSÍ leikararnar, sum eru uppaldir í felagnum. Klæmint Matras hjá B63 spælir eisini framhaldandi við barndómsfelagnum, men har er egna framleiðslan ikki eins stór og hjá runavíkingunum*

gult23 cyan23 magenta23 svart23



# Aftur til Scilly

**Í dag fara tvær føroyskar bátsmanningar undir ferðina til Scilly-oyggjarnar at luttaka í HM kappingini í gig-róðri**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*



*Manningarnar, sum fara at umboðað føroysku litirnar á Scilly-oyggjunum, eru her avmyndaðar uttan fyri ÍSF húsið, har RSF hevði tíðindafund sunnudagin*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Hetta er fjórða árið á rað, at tað stendur føroyskum bátum í boði at taka lut í HM kappingini á Scilly-oyggjunum, og hóast avrikini higartil hava verið heldur óstøðug, hava kappinginar sýnt, at føroyingar als ikki standa nakað aftan fyri hini londini, tá rógvast skal um kapp.

## Nýggir bátar

Fyrstu tvey árini vóru tað bert vinnararnir av 10-mannafarskappingini, sum tóku lut á Scilly oyggjunum, og vóru føroysku umboðini her ávíkavíst Vestmenningur og Eysuroyingur. Ferðin hjá hesum varð goldin av Amarada Hess, sum eisini stóð fyri fyrireikingunum til ferðina. Í fjør hendi so eisini tað, at kvinnurnar á Jarnbardi sjálvar tóku stig til ferðina, og úrslitið hjá teimum var so avgjørt hitt besta, sum føroyskir bátar enn hava fingið. Hjá monnunum var tað eins og árið fyri Eysturoyingur, sum umboðaði Føroyar.

Í ár verða tað so tvær spildurnýggjar manningar, sum skulu taka lut í kappingini. Kappingin um at koma við til Scilly varð nevnliga umskipað í fjør, soleiðis at tað hjá monnum vóru seks-, átta- og tíggjumannafør, sum kappaðust, meðan fimm- og seksmannafør hjá kvinnunum kappaðust sínamillum. Úrslitið av hesum gjørdist, at Argjabáturin og Frúgvin vunnu rættin til luttøkuna, og tí verða tað hesir bátar, sum nú skulu umboða Føroyar.

Fyri Frúnna er tó galdandi, at tað ikki er gjørligt hjá teimum at hava alla manningina við á ferðini, og tí hava tær fingið hjálp frá ávíkavíst Jarnbardi og Hvessingi. Sostatt verða tað ikki tvær púra óroyndar – í hesum høpi – manningar, sum fara avstað.

Hetta er annars fyrstu ferð, at Róðrarsambandið einsamalt stendur fyri fyriskipanini av ferðini. Eftir at Amarada Hess trý ár á rað hevur sent eina bátsmanning avstað, er skipanin í ár broytt soleiðis, at Amarada Hess rindar RSF eitt ávíst gjald, sum sambandið so sjálvt umsitur. Róðrarsambandið hevur so tikið avgerð um eisini at nýta nakað av veddingarpengunum til endamálið, soleiðis at ráð eru til at senda tvær manningar avstað.

Sjálv kappingin byrjar annars 5. mei, so ivaleyst verður meira at hoyra til avrikini hjá føroysku bátsmanningunum komandi dagarnar.

# Skjúttarnir skulu finnast

**Fyrra av tveimum úttøkuumførum til Oyggjaleikirnar í bogaskjóting varð hildið um vikuskiftið**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin varð 1. partur av úttøkukapping til Oyggjaleikalands-liðið í bogaskjóting.

Kappingin fór fram á Svangaskarði og kappast varð bæði í compound og recurve.

Úrslitini vóru sum heild góð. Per Holm Andersen setti nýtt met á 70 m teininum við at fáa 339 stig, og bæði Annlott og Bjarni Rasmussen settu persónlig met. Men í hinum endanum vóru eisini óhapp.

Jóannes Poulsen sleyt tveir kordelar í streinginum, so hann mátti útskifta streingin. Ein nýggjur strongur er ongantíð heilt eins og gamli, so Jóannes mátti nýta nøkur skot at venja seg við nýggja siktið. Hetta kostaði honum nógv stig, so hann endaði nakað aftanfyri tað, hann annars átti.

Úrslitini av kappingini sunnudagin vóru:

Compound:
Per Holm Andersen 1315 stig
Schandorff Vang 1284 stig
Albert Dam 1279 stig
Jóannes Poulsen 1245 stig

Recurve:
Poul Martin Joensen 1098 stig
Annlott Rasmussen 1030 stig
Bjarni Rasmussen 988 stig

Seinna og endaliga umfarið av úttøkukappingini verður komandi vikuskifti.



*Annlott Rasmussen, sum her sæst í leiklutinum sum uppteljari, setti persónligt met á Svangaskarði*

*Mynd: sj*

# FM í reiðskapsfimleiki

**Um vikuskiftið var FM í reiðskapsfimleiki hildið í Ítróttahøllini í Runavík. Niðanfyri prentað vit úrslitini av kappingini**

| Bólkur 1 | Biti | | Gólv | | Lop | | Íalt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rannvá L. Olsen, FOK | 28,48 | 6 | 25,06 | 6 | 28,86 | 4 | 82,40 | 6 |
| Vár Honnudóttir, Ljósið | 29,37 | 4 | 26,40 | 5 | 27,54 | 5 | 83,31 | 5 |
| Kira Danielsen, Ljósið | 29,12 | 5 | 29,27 | 3 | 27,39 | 6 | 85,78 | 4 |
| Annika Dimon, HF | 31,28 | 1 | 29,58 | 2 | 31,59 | 1 | 92,45 | 1 |
| Elinborg Durhuus, Ljósið | 31,02 | 2 | 29,77 | 1 | 29,64 | 3 | 90,43 | 2 |
| Brim Hoydal, Ljósið | 30,08 | 3 | 28,71 | 4 | 30,81 | 2 | 89,60 | 3 |
| | | | | | | | | |
| Bólkur 2 | | | | | | | | |
| Rósa Heinesen, Støkk | 26,98 | 5 | 32,38 | 3 | 31,20 | 4 | 90,56 | 4 |
| Joan Sørensen, HF | 30,03 | 1 | 29,58 | 5 | 29,64 | 5 | 89,25 | 5 |
| Henny Joensen, Støkk | 29,87 | 2 | 34,23 | 1 | 34,32 | 1 | 98,42 | 1 |
| Monika W. Poulsen, Støkk | 26,08 | 6 | 33,74 | 2 | 31,98 | 2 | 91,80 | 3 |
| Bjørg Ellendersen, HF | 28,71 | 4 | 29,24 | 6 | 27,20 | 6 | 85,15 | 6 |
| Sonja Joensen, Støkk | 29,16 | 3 | 32,19 | 4 | 31,98 | 2 | 93,33 | 2 |

| Bólkur 3 | Biti | | Gólv | | Lop | | Íalt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Unn Kragesten, Ljósið | 5,50 | 4 | 6,55 | 3 | 7,40 | 3 | 19,45 | 2 |
| Elisabeth Jacobsen,Støkk | 6,47 | 2 | 6,40 | 4 | 0,00 | 6 | 12,87 | 6 |
| Mia Káradóttir Mortensen, Ljósið | 7,47 | 1 | 6,75 | 1 | 7,65 | 1 | 21,87 | 1 |
| Vanja Højgaard, Støkk | 4,80 | 6 | 6,65 | 2 | 7,45 | 2 | 18,90 | 3 |
| Elsa Helmsdal, Ljósið | 5,25 | 5 | 5,65 | 5 | 7,20 | 4 | 18,10 | 5 |
| Ann Mari Róin Johannesen, Støkk | 6,05 | 3 | 5,00 | 6 | 7,20 | 4 | 18,25 | 4 |
| | | | | | | | | |
| Bólkur 4 | | | | | | | | |
| Susan P. Olsen, Ljósið | 6,92 | 6 | 7,70 | 2 | 7,65 | 4 | 22,27 | 3 |
| Anita Knudsen, Støkk | 7,67 | 1 | 7,15 | 3 | 7,60 | 5 | 22,42 | 2 |
| Marina Moriates, HF | 7,35 | 4 | 5,15 | 6 | 7,80 | 2 | 20,30 | 6 |
| Durita Knudsen, Støkk | 7,40 | 2 | 7,15 | 3 | 7,20 | 6 | 21,75 | 4 |
| Marjun Persson, HF | 6,95 | 5 | 6,40 | 5 | 7,70 | 3 | 21,05 | 5 |
| Marit Magnussen, Støkk | 7,40 | 2 | 8,25 | 1 | 8,25 | 1 | 23,90 | 1 |
| | | | | | | | | |
| Sarita Heinesen | 5,85 | | 6,55 | | 7,40 | | | |
| Anna Hansen | 5,05 | | 7,00 | | 7,60 | | | |

| Bólkur 1 | Ringar | | Gólv | | Lop | | Íalt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Árni Fredriksberg, Støkk | 27,20 | 6 | 28,96 | 3 | 29,76 | 3 | 85,92 | 5 |
| Búi Person, HF | 30,08 | 2 | 29,76 | 2 | 29,12 | 5 | 88,96 | 2 |
| Jákup Debus Hansen, Støkk | 29,44 | 3 | 30,40 | 1 | 29,92 | 2 | 89,76 | 1 |
| Bárður Johansen, HF | 30,40 | 1 | 26,97 | 6 | 28,32 | 6 | 85,69 | 6 |
| Viljormur Davidsen, Støkk | 27,90 | 5 | 28,52 | 4 | 30,08 | 1 | 86,50 | 4 |
| Karl Løkin,Støkk | 29,44 | 3 | 27,84 | 5 | 29,76 | 3 | 87,04 | 3 |
| | | | | | | | | |
| Bólkur 2 | | | | | | | | |
| Jákup Dam, HF | 33,00 | 1 | 34,03 | 1 | 37,05 | 1 | 104,08 | 1 |
| Øssur D. Eiriksfoss, HF | 30,88 | 5 | 30,08 | 5 | 36,27 | 5 | 97,23 | 6 |
| Jonleif Højgaard, Støkk | 31,20 | 3 | 32,56 | 4 | 35,88 | 6 | 99,64 | 4 |
| Steingrim Eikholm Joensen, HF | 30,72 | 6 | 29,92 | 6 | 36,66 | 2 | 97,30 | 5 |
| Bogi Johannesen, Støkk | 31,04 | 4 | 33,49 | 2 | 36,66 | 2 | 101,19 | 3 |
| Rósing Dam, HF | 32,50 | 2 | 33,15 | 3 | 36,66 | 2 | 102,31 | 2 |

| Bólkur 3 | Ringar | | Gólv | | Lop | | Íalt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Knút Jarnskor, HF | 7,30 | 3 | 8,10 | 2 | 0,00 | 3 | 15,40 | 3 |
| Petur Joensen, Støkk | 7,50 | 2 | 7,70 | 3 | 6,80 | 2 | 22,00 | 2 |
| William H. Jacobsen, HF | 8,10 | 1 | 8,20 | 1 | 7,00 | 1 | 23,30 | 1 |
| | | | | | | | | |
| Bólkur 4 | | | | | | | | |
| Høgni H. Andersen, HF | 8,90 | 2 | 8,80 | 2 | 7,25 | 4 | 24,95 | 3 |
| Pól Esper Hanusson,Støkk | 8,80 | 3 | 8,70 | 3 | 7,75 | 1 | 25,25 | 1 |
| Tórarin H. Petersen, HF | 8,80 | 3 | 8,90 | 1 | 7,20 | 5 | 24,90 | 4 |
| Magni Jacobsen, Støkk | 8,70 | 5 | 8,40 | 5 | 7,48 | 2 | 24,58 | 5 |
| Eyvind A. Hansen, HF | 9,20 | 1 | 8,70 | 3 | 7,30 | 3 | 25,20 | 2 |
| Høgni R. Øster, HF | 0,00 | 6 | 0,00 | 6 | 0,00 | 6 | 0,00 | 6 |
| | | | | | | | | |
| Heini í Dali | 8,60 | | | | | | | |